

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 03 - 2013

# Innrás av oljuarbeiðarum í Hetlandi

Flótandi gistingarhús er júst komið til Hetlands at hýsa umleið 500 oljuarbeiðarum. Stórar útbyggingar Tað krevur støðugt fleiri gistingarhús at kunna hýsa mongu oljuarbeiðarunum, sum koma til Hetlands at standa fyri stóru útbyggingunum av olju- og gassfeltum. Nú um dagarnar kom eitt flótandi hotell, sum kann hýsa fleiri hundrað fólkum, ið skulu til at seta upp eina stóra gassverksmiðju, tað fyrstu av sínum slag, í Sullom Voe, nær Lerwick. Gassverkið, sum er partur av fyrstu útbyggingini av gasskeldum vestan fyri Hetland, er mett at kosta 5 milliardir krónur. Hetta er aðru ferð í trý ár, at siglandi gistingarhúsið kemur til Lerwick. Aftrat hesum kemur at eitt nú gistingarhús er undir bygging í oyggjunum at hýsa oljufólki, sum fara at hava tilknýti til nýggju gassframleiðsluna komandi árini. Tað eru Total og Dong, sum standa fyri byggingini av gassframleiðsluni í oyggjunum. Gassið kemur av leiðunum vestan fyri Hetland. Stóru útbyggingarnar vestan fyri Hetland hava við sær størri krøv til at dýpa hetlendskar havnir og eru stórar íløgur gjørdar í eitt nú havnini í Lerwick skrivar web@stv.tv. Havnameistarin í Lerwick sigur, at dýpingin av havnini framvið bryggjuni ger tað møguligt hjá størri veitingarskipum at leggja at og veita tænastur til oljuleiðirnar vestan fyri Hetland. Í hesum døgum koma stór veitingarskip við modulum til verksmiðjuna. Flótandi gistingarhúsið Bibby Stockholm kann hýsa 500 oljuarbeiðarum, sum multinationala fyritøkan Petrofac útvegar. Mynd Valian Útgerð til gassvirkið kemur til Lerwick. Mynd Valian.